# Almennar tryggingartreytir fyri P/F Tryggingarfelagið Lív

Galdandi fyri allar tryggingar við marknaðarrentu.

P/F Tryggingarfelagið Lív verður hereftir skrivað LÍV.


§ 1 Persónar
§ 2 Gildisøki og grundarlag
§ 3 Nær er tryggingin galdandi?
§ 4 Hvar er tryggingin galdandi?
§ 5 Tryggingargjald
§ 6 Vantandi tryggingargjald
§ 7 Trygging aftur í gildi
§ 8 Gjaldsundantøka og óarbeiðsføri
§ 9 Krígs- og kjarnorkuskaðar o.t.
§ 10 Hvat fevna gjaldsundantøka og trygging við óarbeiðsføri um?
§ 11 Hvat fevnir tryggingin ikki um?
§ 12 Bíðitíð
§ 13 Útgjald av tryggingarveiting
§ 14 Útgjald við deyða
§ 15 Frítryggingarskjal
§ 16 Afturkeypsvirði
§ 17 Serligar treytir
§ 18 Lógargrundarlag
§ 19 Útrokningargrundarlag
§ 20 Broyting av tryggingartreytum
§ 21 Kærumøguleikar


22. juni 2012

## § 1 Persónar

1. Tryggingartakari er tann, ið hevur gjørt avtalu um trygging við LÍV.
2. Tryggjaði er tann, hvørs lív er tryggjað.
3. Tilskilaði er tann, sum hevur rætt til tryggingarveitingina, um hon kemur til gjaldingar, eftir at tryggjaði er deyður.
4. Í tryggingaryvirlitinum sæst, hvør ið ávikavist er tryggingartakari, tryggjaði og tilskilaði.
5. Tryggingartakari og tryggjaði kann vera ein og sami persónur, ella ymiskir persónar.

## § 2 Gildisøki og grundarlag

1. Í tryggingaryvirlitinum sæst, hvat tryggingin fevnir um.
2. Áðrenn tryggingin verður sett í gildi, skal LÍV hava móttikið og góðkent tryggingaráheitan og umbidnar heilsuupplýsingar frá tryggingartakaranum.
3. Eru upplýsingarnar ikki rættar, ella eru viðurskifti duld fyri LÍV, kann tryggingarveiting lækka ella falla burtur heilt ella lutvíst, sambært §§ 4-10 í galdandi lóg um tryggingaravtalur.
4. Tryggingin kann verða hækkað ella broytt sambært upplýsingum frá tryggingartakaranum. Sí eisini § 19.

# § 3 Nær er tryggingin galdandi?

1. Tryggingin er galdandi frá ásetta gildiskomudegnum, treytað av, at LÍV góðtekur tryggingina sambært ásettu treytum.
2. Góðtekur LÍV ikki tryggingina, kemur tryggingin ikki í gildi, fyrr enn tryggingartakarin hevur góðtikið møguligar sertreytir. Annar gildiskomudagur kann verða avtalaður í hesum sambandi.
3. Um LÍV móttekur tryggingargjald uttan at hava móttikið viðkomandi skjøl og upplýsingar frá tryggingartakaranum, kemur tryggingin ikki í gildi, og móttikni peningurin verður goymdur sum vanlig uppsparing.
4. Doyr tryggjaði, eftir at LÍV hevur móttikið tryggingargjald, men áðrenn viðkomandi skjøl og upplýsingar eru móttikin, verður móttikna upphæddin afturgoldin í samsvari við § 14.
5. Verður tryggjaði óarbeiðsførur, eftir at LÍV hevur móttikið tryggingargjald, men áðrenn LÍV hevur móttikið umbiðin skjøl og upplýsingar, verður einki endurgjald veitt.
6. Pkt. 3-5 eru ikki galdandi, um tryggingartakari er fevndur av sáttmála, har onnur avtala er gjørd um gildiskomu.

## § 4 Hvar er tryggingin galdandi?

1. Tryggingin er galdandi í Norðurlondum og ES, sí tó § 9.
2. Tryggingin er ikki galdandi, um tryggjaði ferðast ella hevur fast uppihald uttan fyri Norðurlond ella ES í meira enn 1 ár.
3.Tá tryggjaði veit, at ferðin ella uppihaldið uttan fyri Norðurlond ella ES verður longri enn eitt ár, skal Lív hava fráboðan um hetta beinanvegin, so LÍV kann taka støðu til, um tryggingin kann verða víðkað.

## § 5 Tryggingargjald

1. Tryggingargjald verður ásett sambært útrokningargrundarlagnum hjá LÍV, sí § 19.
2. Gjaldfreist fyri fyrsta tryggingargjaldið er 14 dagar eftir at tryggingin er komin í gildi, um ikki annað er avtalað.
3. Um tryggingargjald verður goldið við inngjaldskorti, verður tað sent á tann bústað í Føroyum, sum tryggingartakarin hevur latið LÍV.
4. Um tryggjaði, sum er fevndur av trygging við leypandi tryggingargjaldi, doyr, afturrindar LÍV tryggingargjald, ið er goldið eftir 1. í mánaðinum eftir deyðadagin.

## § 6 Vantandi tryggingargjald

1. Tryggingin fer úr gildi beinanvegin, um fyrsta tryggingargjaldið ikki verður goldið rættstundis.
2. Verður eitt seinni tryggingargjald ikki goldið innan 3 mánaðir eftir gjaldfreist, fer tryggingin úr gildi, sí tó § 15.
3. Er áminning um vantandi tryggingargjald ikki send minst eina viku áðrenn freistina á 3 mánaðir, fer tryggingin úr gildi eina viku eftir at áminningin er send.
4. LÍV kann í serligum førum játta gjaldskáa.

## § 7 Trygging aftur í gildi

1. Trygging, sum er farin úr gildi av vantandi tryggingargjaldi, kemur aftur í gildi, um gjaldkomin tryggingargjøld verða goldin innan 3 mánaðir eftir, at tryggingin varð sett úr gildi.
2. Verða gjaldkomin tryggingargjøld goldin seinni enn 3 mánaðir eftir at tryggingin er sett úr gildi, kann tryggingin verða sett aftur í gildi, treytað av, at heilsuupplýsingar verða latnar og góðtiknar av LÍV, og gjaldkomin gjøld goldin innan 3 ár eftir gjalddagin fyri fyrsta ógoldna tryggingargjaldið.

## § 8 Gjaldsundantøka og óarbeiðsføri

1. Fevnir tryggingin um rætt til gjaldsundantøku og/ella veiting við óarbeiðsføri, skal LÍV hava fráboðan beinanvegin, um tryggjaði verður óarbeiðsførur. Fráboðanin skal vera skrivlig, á oyðublaði frá LÍV.
2. Gjaldsundantøka og trygging fyri óarbeiðsføri eru bert galdandi, um arbeiðsførið hjá tryggjaða er skert sum tilskilað í tryggingaryvirlitinum.
3. Gjaldsundantøka og veiting við óarbeiðsføri eru galdandi fram til tann í tryggingaryvirlitinum avtalaða aldur, treytað av, at arbeiðsførið er skert sambært stk. 2, og tryggjaði er á lívi.
4. Gjaldsundantøka og tryggingarveiting við óarbeiðsføri eru treytaðar av, at tryggjaði er í neyðugari læknaviðgerð og fylgir forskriftum læknans.
5. LÍV kann krevja, at tryggjaði verður kannaður av lækna. LÍV rindar útreiðslur fyri kravdar læknaváttanir, kanningar o.l.
6. LÍV kann krevja at fáa innlit í inntøkur hjá tryggjaða áðrenn skaðatilburðin og í útgjaldstíðarskeiðnum.
7. Fær tryggjaði arbeiðsførið aftur, soleiðis at fortreytir ikki longur eru fyri gjaldsundantøku og/ella veiting við óarbeiðsføri, skal tryggingartakarin gjalda fult tryggingargjald, og veitingin við óarbeiðsføri fellur burtur.

## § 9 Krígs- og kjarnorkuskaðar o.t.

1. Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri og deyða, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av at tryggjaði fer til land, har kríggj, krígslíknandi umstøður, uppreistur ella borgarligur ófriður er, og/ella um tryggjaði luttekur í hesum. Tryggingin er tó galdandi í upp til 1 mánaða, um tryggjaði var í økinum tá ófriðurin byrjaði.
2. Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri og deyða, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av øktum vanda í sambandi við kjarnorkuandgerð, t.d. kjarnukloyving (fissión), kjarnusamanbræðing (fusión) og geislavirkið burturkast, uttan mun til um tílíkur tilburður berst á í friðar- ella krígstíð.
3. Tryggingin fevnir ikki um óarbeiðsføri, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av at tryggjaði hevur verið í øki uttan fyri Føroyar, har almennur myndugleiki hevur ávarað ímóti heilsuvanda ella øðrum vanda.

## § 10 Hvat fevna gjaldsundantøka og trygging við óarbeiðsføri um?

1. Fevnir tryggingin um rætt til veiting við óarbeiðsføri, er tryggingarveiting treytað av, at óarbeiðsføri er íkomið í tryggingartíðarskeiðnum. Arbeiðsførið skal vera skert sum tilskilað í tryggingaryvirlitinum, orsakað av sjúku ella vanlukkutilburði.

2. Óarbeiðsføri verður staðfest við læknaligari meting, og við atliti til, hvat tryggjaði er førur fyri at forvinna við skerdum arbeiðsføri.
3. Fyribils metingin av inntøku- og arbeiðsmøguleikum tryggjaða verður gjørd við støði í verandi heilsustøðu, útbúgving og funktiónum, ið vóru tengdar at fyrrverandi yrki tryggjaða.
4. Endaliga metingin av inntøku- og arbeiðsmøguleikum tryggjaða verður gjørd við støði í evnum hansara at røkja eitthvørt starv.
5. Um tryggjaði fær rætt til útgjald frá Arbeiðsloysisskipanini, missir hann rættin til tryggingarveiting.

## § 11 Hvat fevnir tryggingin ikki um?

1. Eingin tryggingarveiting og/ella gjaldsundantøka verður veitt, um óarbeiðsføri stendst av:

    a. Sjúku ella vanlukkutilburði, sum tryggjaði hevur elvt til við vilja ella av grovum ósketni.

    b. Sjúku ella vanlukkutilburði, orsakað av sjálvelvdum rúsi, misnýtslu av rúsdrekka,
    ella øðrum rúsandi evnum.

    c. Sálarligari sjúku, sum læknaliga ikki verður roknað sum drúgv sálarlig sjúka, umframt kropsligum sjúkum uttan objektiv sjúkueyðkenni, tó undantikið støður, ið elva til innlegging á sjúkrahúsi.

2. Treytað av, at tryggingin hevur verið í gildi uttan slit í minst eitt ár áðrenn deyðadagin, fevnir tryggingin um, at tryggjaði doyr av sjálvmorði ella sjálvmorðsroynd.

3. Treytað av, at tryggingin hevur verið í gildi uttan slit í minst eitt ár áðrenn tryggingarhendingina, fevnir tryggingin um sjúku ella vanlukkutilburð, íkomin í sambandi við venjing ella luttøku í:

a. Motorkappkoyring av øllum slagi.
b. Fjallaklintran
c. Stríðsítrótti.
d. Fallskíggjaútlopi, drekaflúgving o.l.
e. Allari ítrótt, sum tryggjaði íðkar móti gjaldi e.l.

## § 12 Bíðitíð

1. Gjaldsundantøka og trygging fyri óarbeiðsføri eru teknaðar við bíðitíð á 3 mánaðir, um ikki annað er avtalað.
2. Bíðitíðin byrjar, tá tryggjaði lýkur treytirnar fyri útgjaldi av tryggingarveiting.
3. Útgjaldið byrjar tá óarbeiðsførið hevur verið uttan slit í allari bíðitíðini.

## § 13 Útgjald av tryggingarveiting

1. Tryggingarveiting verður útgoldin mánaðarliga, um ikki onnur avtala er gjørd.
2. Stødd av tryggingarveiting er tilskilað í tryggingaryvirlitinum.

3. Gjaldsundantøka og/ella stødd av tryggingarveiting verða ásettar, tá óarbeiðsførið er staðfest. Ásettu upphæddirnar verða óbroyttar, hóast útgoldið verður í longri tíðarskeið.
4. Um fráboðan um óarbeiðsføri verður móttikin av LÍV seinni enn 6 mánaðir eftir, at tryggjaði hevur mist arbeiðsførið, verður skerda arbeiðsførið roknað frá fráboðanardegnum. Í serligum førum kann óarbeiðsføri verða roknað at vera íkomið fyrr.
5. LÍV kann altíð krevja skjalprógv fyri, at tryggjaði lýkur treytirnar fyri gjaldsundantøku og/ella óarbeiðsførisveiting.
6. Tryggingarveiting verður útgoldin áðrenn 1. í hvørjum mánaði, og heldur áfram meðan treytirnar fyri óarbeiðsføri eru loknar. Tó ikki longur enn ásett í tryggingaryvirlitinum.

## § 14 Útgjald við deyða

1. Um tryggjaði doyr í tryggingartíðini, verður útgoldið tryggingartakaranum ella næsta avvarðandi, um ikki annar er tilskilaður.
2. Næsti avvarðandi er at skilja sum ásett í tryggingaravtalulógini.

## § 15 Frítryggingarskjal

1. Steðgar tryggingartakarin at gjalda tryggingargjald í ótíð, og tryggingin hevur fingið virði, verður hon umskrivað til frítryggingarskjal sambært galdandi útrokningargrundarlagi, og ábyrgdin hjá LÍV steðgar sambært § 6.

2. Byrjar tryggingartakarin aftur at gjalda tryggingargjald, kemur tryggingin aftur í gildi, sambært § 7.
3. Umsitingargjald fyri frítryggingina verður goldið av upphæddini. Um upphæddin minkar burtur í einki, verður tryggingin strikað.

## § 16 Afturkeypsvirði

1. Hevur tryggingin fingið afturkeypsvirði, verður tað útgoldið eftir áheitan, sí tó pkt. 2-6.
2. Afturgjald er treytað av, at afturkeysvirðið ikki er størri enn virðið á tí veiting, sum fellur til gjaldingar, um tryggjaði doyr.
3. Í øllum øðrum førum kann afturkeypsvirðið bert verða útgoldið eftir serligari avtalu við LÍV.
4. Í serligum førum kann LÍV fyribils víkja frá afturkeypsrættinum.
5. Afturkeypsvirðið kann ikki krevjast útgoldið, tá fyrivarni er tikið móti kontantum útgjaldi av afturkeypsvirðinum.
6. Somuleiðis kann afturkeypsvirðið ikki útgjaldast uttan serliga avtalu, tá útgjald av
tryggingarveitingini er treytað av, at tryggjaði og/ella samtryggjaði eru á lívi.

## § 17 Serligar treytir

Tað skal vera tilskilað í tryggingaryvirlitinum, ella skal tryggingartakarin hava fingið skrivlig boð, um:

a. Ein ella fleiri av frammanfyri nevndu ásetingum ikki eru galdandi fyri eina trygging.
b. Serligar treytir eru galdandi fyri eina trygging.

## § 18 Lógargrundarlag

1. Umframt hesar treytir og møguligar sertreytir, er føroysk lóggáva galdandi.

## § 19 Útrokningargrundarlag

1. Tryggingargjald og tryggingarveiting verður grundað á útrokningargrundarlag, sum er fráboðað Tryggingareftirlitinum.
2. Útrokningargrundarlagið kann verða broytt við fráboðan til Tryggingareftirlitið.

## § 20 Broyting av tryggingartreytum

1. Um trygging er stovnað sambært sáttmála, kann LÍV broyta tær í tryggingini ásettu veitingar, um broytingar verða gjørdar í viðkomandi sáttmála.

2. Tryggingartakari fær fráboðan um møguligar broytingar sambært stk. 1.

## § 21 Kærumøguleikar

1. Um tryggjaði ikki er nøgdur við avgerð hjá LÍV, kann kæra verða send LÍV.
2. Um tryggjaði ikki er nøgdur við avgerðina hjá LÍV í kærumálinum, kann nýggj kæra verða send:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegardsvej 2,1
1572 København V

3. Kæra til Ankenævnet for Forsikring skal verða skrivað á serligt oyðublað, sum fæst á www.ankeforsikring.dk, ella frá LÍV.
4. Kærugjald, ásett av Ankenævnet for Forsikring, skal verða goldið, áðrenn kæra verður viðgjørd í Ankenævnet for Forsikring.